LANDSGRANNSKOÐANIN

# Søga

Um grannskoðanarskipanina undir heimastýrislógini

# Innihaldsyvirlit

1 LÓGGÁVU- OG ÚTINNANDI VALDIÐ Í FØROYUM ............................................. 3

2 GRANNSKOÐANARSKIPANIN 1948-1976 ................................................................. 3

3 GRANNSKOÐANARSKIPANIN 1976-1999 ................................................................. 4

4 GRANNSKOÐANARSKIPANIN EFTIR 1999............................................................... 5

# SØGA

## Um grannskoðanarskipanina undir heimastýrislógini

## 1 Lóggávu- og útinnandi valdið í Føroyum

Eftir seinna heimsbardaga var stórur meirluti fyri eini nýskipan av Føroya støðu í ríkinum. Eftir samráðingar millum umboð fyri Løgtingið og donsku stjórnina, varð fólkaatkvøða hildin 14. september 1946. Veljararnir skuldu atkvøða um eitt ógvuliga avmarkað størri sjálvstýri ella loysing frá Danmark. Úrslitið var ein tepur meirluti fyri loysing, men ósemja tók seg upp um tulkingina av úrslitinum - um tað var vegleiðandi ella bindandi. Eftir løgtingsvalið í 1946 og nýggjar tingingar við danir, var Heimastýrislógin sett í gildi í 1948.

Eftir hetta broyttist virksemið hjá Løgtinginum munandi. Meðan tað higartil bara hevði verið ráðgevandi, fekk tað nú innan karmar Heimastýrislógarinnar lóggávuvald í yvirtiknum sermálum.

Hvussu heimastýrið skipar seg innanhýsis, er eitt yvirtikið sermál. Tað varð gjørt við Stýrisskipanarlógini, Ll. nr. 1 frá 13. mai 1948 um stýrisskipan Føroya í sermálum (verandi stýrisskipanarlóg er nr. 103 frá 26. juli 1994). Sambært stýrisskipanarlógini er valdsbýtið í Føroyum soleiðis, at lóggávuvaldið í yvirtiknum málum er hjá Løgtinginum og løgmanni í felag, útinnandi valdið hjá landsstýrinum, meðan dómsvaldið í slíkum málum liggur hjá dómstólum ríkisins.

Í Løgtinginum, sum verður valt fyri 4 ár í senn, sita í mesta lagi 33 tingmenn, sum verða valdir á almennum, loyniligum og beinleiðis vali. Í landsstýrinum sita løgmaður og minst 2 landsstýrismenn. Løgmaður verður tilnevndur óbeinleiðis av Løgtinginum á tann hátt, at løgtingsformaðurin eftir at hava fingið frágreiðing frá floksformonnunum leggur fyri Løgtingið uppskot, sum atkvøtt verður um. Løgmaður tilnevnir sjálvur landsstýrismenninar. Hvørki løgmaður ella landsstýrismaður kann verða sitandi í sessi sínum, um so er, at Løgtingið við atkvøðugreiðslu, har helmingurin av øllum tingmonnum atkvøður fyri, hevur samtykt, at tað ikki longur hevur álit á løgmanni ella viðkomandi landsstýrismanni. Løgmaður kann, nær ið verða skal, skriva út nýval til Løgtingið.

## 2 Grannskoðanarskipanin 1948-1976

Í § 23 í stýrisskipanarlógini frá 1948 varð ásett, at løgtingsvaldu grannskoðararnar skuldu granska ársroknskapirnar og leggja teir fyri tingið til viðgerðar og samtyktar.

Í fimti- og fyrst í sekstiárunum var tað løgtingsins grannskoðaradeild, sum hevði roknskapar-grannskoðanina um hendi, eitt skifti í samstarvi við eitt danskt ríkisviðurkent grannskoðaravirki. Sambært fylgiskjølunum til fíggjarløgtingslógina 1964/65 varð grannskoðaradeild løgtingsins tikin av 1. apríl 1964 eftir samtykt fíggjarnevndarinnar, og øll roknskapargrannskoðanin varð yvirtikin av einum ríkisviðurkendum grannskoðara í Føroyum.

Í løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965 um grannskoðing av landsins almennu roknskapum vórðu ásettar nærri reglur um arbeiðsøki og heimildir løgtingsgrannskoðaranna í sambandi við gjøgnumgongd teirra og løgtingsins góðkenning av almennum roknskapum. Í § 4 í

grannskoðanarlógini var m.a. ásett, at løgtingsgrannskoðararnir kundu taka váttanir o.t. frá roknskapargrannskoðanini sum nóg gott prógv fyri beinleikan av tí, sum stóð í roknskapinum.

Søguliga bygdi skipanin á, at ein undirliggjandi "faklig" roknskapargrannskoðan hevði ta grundleggjandi grannskoðanina av landskassaroknskapinum og av øðrum roknskapum um hendi, og at teir síðani vórðu gjøgnumgingnir av politiskt valdum løgtingsgrannskoðarum, áðrenn teir vórðu lagdir fyri Løgtingið til samtyktar.

## 3 Grannskoðanarskipanin 1976-1999

Í 1976 varð ein almenn grannskoðanardeild (Grannskoðanardeild Landskassans) aftur sett á stovn. Reglurnar fyri deildina vóru ikki lógarfestar, men vórðu ásettar av landsstýrinum í "reglugerð fyri internu grannskoðanardeild landskassans" frá 9. juni 1976. Sambært reglugerðini varð landskassans roknskapur og bókføring grannskoðaður av internu grannskoðanardeild landskassans, sum var ein sjálvstøðugur stovnur undir eftirliti av løgtingsins statsautoriseraða grannskoðara. Arbeiðsøki stovnsins var tann "landskassabókføring, sum verður førd og umsitin av Føroya Gjaldstovu." Í reglugerðini varð eisini ásett, at "teir stovnar, sum hava sjálvstøðuga bókføring og roknskap, koma ikki undir grannskoðan av grannskoðanardeildini".

Løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965 um grannskoðing av landsins almennu roknskapum hevði "Lov om revision af statsregnskabet" frá 1928 sum fyrimynd. Lógin fevndi einans um reglur, heimildir og krøv viðvíkjandi arbeiðinum hjá løgtingsgrannskoðarunum - ikki um reglur fyri roknskapargrannskoðanini. Í Danmark vóru viðurskiftini ímillum ta undirliggjandi og ta parlamentarisku grannskoðanina - ávikavist "rigsrevisionen" og "statsrevisorerne" - skipað við lóg, men í Føroyum vóru viðurskiftini hjá tí undirliggjandi grannskoðanini ongantíð nærri ásett við lóg.

Sambært § 8 í lógini stílaði fíggjarnevndin fyri roknskapargrannskoðanini. Í løgtingssamtyktini frá 27. mars 1985 um reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna var ásett, at løgtingsgrannskoðararnir undir virki teirra kundu nýta frágreiðingar frá Grannskoðanardeild Landskassans og uttanhýsis privatu grannskoðanini. Roknskapargrannskoðanin var ikki nærri lýst í lógini ella í løgtingssamtyktini.

Burtursæð frá serligu grannskoðanaravtaluni frá 15. oktober 1991 millum fíggjarnevndina og "Socialministeriet", viðvíkjandi grannskoðan av tí partinum av almannaútreiðslunum, har talan var um ríkisendurgjald, hevði fíggjarnevndin ikki ásett nærri reglur fyri roknskapargrannskoðanini.

Grannskoðanardeild Landskassans gjørdi í 1991 vart við, at reglugerðin og lógargrundarlagið fyri grannskoðanini var ikki tíðarhóskandi, at ivi var um fleiri grundleggjandi viðurskifti so sum krøv til grannskoðanina, heimildir, arbeiðsøki og uppgávur, ábyrgd og skyldur, tíðarfreistir, fráboðan, samskifti og samstarv við løgtingsgrannskoðararnar, ta eksternu grannskoðanina, landsstýrið, Løgtingið og fíggjarnevndina. Eisini privatu grannskoðararnir ynsktu nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Í 1992 heitti fíggjarnevndin á løgtingsgrannskoðararnar um at viðgera eina umskipan av grannskoðanini av teimum almennu roknskapunum og lata Formansskapi løgtingsins álit um tað.

Í mars 1993 lótu løgtingsgrannskoðararnir Formansskapi løgtingsins eitt álit viðvíkjandi grannskoðanini av tí almenna virkseminum. Mælt varð til at umskipa grannskoðanina við lóg, við tí tilsvarandi danska lógargrundarlagnum sum fyrimynd, og hjáløgd vórðu:

- uppskot til løgtingslóg um løgtingsgrannskoðararnar - (lm. nr. 4/13-1992)
- uppskot til reglugerð um val og virki løgtingsgrannskoðaranna - ( lm. 4/15-1992)
- uppskot til løgtingslóg um grannskoðan av landsins almennu roknskapum - (lm. 4/14-1992)

Formansskapur løgtingsins legði uppskotini fyri tingið, og vórðu tey beind í fíggjarnevndina. Av tí at løgtingsval varð útskrivað í 1994, fullu uppskotini burtur.

# 4 Grannskoðanarskipanin eftir 1999

Síðani var spurningurin um umskipan av grannskoðanini aftur viðgjørdur av løgtingsgrannskoðarunum og Grannskoðanardeild Landskassans. Peter Christensen frá donsku Ríkisgrannskoðanini veitti ráð og vegleiðing, í sambandi við at nýtt lógaruppskotið varð tilevnað. Nýggja lógaruppskotið hevði í minni mun enn uppskotini frá 1993 tað tilsvarandi danska lógargrundarlagið sum fyrimynd, og var á fleiri økjum ein lógarfesting av verandi praksis í Føroyum.

Ætlanin við lógini var at tryggja, at reglurnar fyri grannskoðan og løgtingsins góðkenning vóru neyvar og tíðarhóskandi. Nýskapandi, í mun til reglurnar, sum tá vóru galdandi, er m.a., at:

1. Grannskoðanardeild landskassans (interna grannskoðanin) er formliga umskipað til Landsgrannskoðanina, ein óheftur stovnur undir Løgtinginum
2. Formanskapur løgtingsins skal tilnevna ein óheftan Landsgrannskoðara at stíla fyri roknskapargrannskoðanini
3. "vanlig" fyrisitingargrannskoðan verður áløgd roknskapargrannskoðanini, sum verður útint av privatum grannskoðarum og Landsgrannskoðanini (endamálið við fyrisitingargrannskoðan er at eggja til sparsemi, produktivitet og effektivitet í fyrisitingini)
4. løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja roknskapargrannskoðanini “víðkaða” fyrisitingargrannskoðan
5. ein og hvør kann krevja at fáa høvi at kunna seg um ávísar frágreiðingar frá grannskoðanini til løgtingsgrannskoðararnar
6. landsstýrismaðurin skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini frágreiðing um frávik millum játtanar- og roknskapartøl innan 6 mánaðir eftir fíggjarárslok
7. løgtingsgrannskoðararnir og Landsgrannskoðanin kunnu krevja at fáa til kanningar roknskapir hjá ymiskum stovnum, feløgum o.ø. sum fáa stuðul v.m. frá landinum
8. reglurnar viðvíkjandi grannskoðan av landsroknskapinum og roknskapum hjá landsstovnum, verða tillagaðar Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m. og Ll. nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya
9. ein lógarfest tíðarfreist verður ásett at svara skrivum og viðmerkingum frá grannskoðanini
10. ein lógarfest tíðarfreist verður ásett fyri, nær roknskapargrannskoðanin skal lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um grannskoðanina

11. ein lógarfest tíðarfreist verður ásett fyri, nær løgtingsgrannskoðararnir skuldu leggja roknskapir fyri Løgtingið til samtyktar

Lógaruppskotið varð sent til ummælis í november 1998. Lógaruppskotið varð síðani broytt á nøkrum økjum og lagt fyri tingið í mars 1999 og varð einmælt samtykt í apríl 1999.